Álit

í

løgtingsmáli nr. 68/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um tíðaravmarkað avgjald á ferðandi við komu til Føroya (Leingjan av tíðarskeiðnum, ið ferðandi skulu rinda avgjald við komu til Føroya)

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, hevur lagt málið fram 8. desember 2020 og eftir 1. viðgerð 10. desember 2020, er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. desember 2020.

Ein samd nevnd vil vísa á, at endamálið við hesum lógaruppskoti er at leingja tíðarskeiðið, ið ferðandi skulu rinda avgjald við komu til Føroya.

Heimildin í verandi lóg gongur út 31. desember 2020, men við samtykt av hesum lógaruppskoti verður tíðarskeiðið longt til 31. mars 2020.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Fíggjarnevndin, 11. desember 2020

Magnus Rasmussen formaður	Aksel V. Johannesen næstformaður	Jákup Mikkelsen
Bill Justinussen	Kristin Michelsen	Kristina Háfoss
	Ruth Vang	